Vi› fyri at vinna

Profilur

Sigrun Mikkelsen

fødd 22.05.66

Spælt í Neistanum sí›ani hon var á lei› 7 ára gomul, har hon spældi øll ungdómsárini.

Kom í 1985 á besta kvinnluli›i› hjá Neistanum, har hon hevur veri› vi› til at vunni› í alt ellivu meistaraheiti. Onkur av árunum sum leikandi venjari.

Spælt vi HB sí›ani 1985, og var her vi› til at vinna seks FM heiti›

Gjørdist fyrsti kvinnuligi fótbóltsforma›urin í Føroyum, og var forma›ur í HB í nærum tr‡ ár.

Er útbúgvin fysioterapeutur, og starvast í dag á verkhúsinum, Virkni.

B‡r saman vi› Hans Jákupi Mikkelsen, og eiga tey bæ›i f‡ra mána›a gamla Trónd.

Sigrun Mikkelsen telist ikki millum teirra, sum bara eru vi› fyri at luttaka. Sjálv sigur hon, at hon als ikki kann gó›taka at gerast nummar tvey, og heta er ikki bara tos. Hon hevur so sanniliga eisini víst hetta í verki

PROFILUR
Or›: Jákup Mørk
Myndir: Álvur Haraldsen

Ta› man vera frá ítróttinum, ella skuldi man kanska sagt hond- og fótbóltinum, at navni›, Sigrun Mikkelsen, er vor›i› kent millum lesararnar.

Ígjøgnum fleiri ár var hon partur av kvinnuli›inum hjá Neistanum, sum var fullkomuliga einará›andi í føroyskum kvinnuhondbólti. Eisini í fótbóltshøpi er ta› vor›i› talan um fleiri meistaraheiti› vi› HB, tó at sigursrø›in her ikki gjørdist heilt so lang sum í hondbóltinum.

Eisini sum ítróttalei›ari hevur hon havt sítt at takast vi›, og hevur hon í hesum høpi eisini roynt seg sum forma›u hjá HB, umframt at hon eiisni hevur vant bestu neistakvinnurnar.

Naka› at liva upp til

Sjálv grei›ir hon frá, at tí›in í Neistanum byrja›i, tá hon sum 7 ára gomul fór at fáast vi› hondbólt.

– Eg havi spælt vi› Neistanum alla tí›ina, og lat meg beinan vegin siga, at eg havi havt ta› gott í felagnum. Sum venjari gjørdist eg eisini aktiv, og tá eg var eini 15 ár, gjørdist eg venjari hjá gentum 10. Eg vandi so hesar somu genturnar í eini fimm, seks ár, og sí›ani havi eg so eisini havt stuttleikan av at spæla saman vi› fleiri teirra.

– At byrja vi› vunnu vit ikki so øgiliga nógv, og serliga høvdu vit trupulleikar av at basa Kyndli. Hetta broyttist tó, tá vit komu upp móti eldru bólkunum.

– Kvinnurnar hjá okkum høvdu tá eisini vunni› alt í fleiri ár, so ta› var naka› at liva upp til, á man umbo›a›i felagi› í kvinnudeildini. Ta› vísti seg eisini, at tá vit so komu upp í vaksnamannadeildirnar, so helt hendan sigursrø›in fram.

– Fyrsta li› hev›i alla tí›ina eina spakuliga útskifting, og hyggur tú t.d. at li›num, sum vann so nógv í áttatiárunum, so var talan um leikarar í øllum aldursbólkum.

Hini høvdu vir›ing

Hetta hevur tó sjálvandi ikki veri› einasta frágrei›ingin til, at Neistin vann alt í somiki› nógv ár. Hini li›ini hava eisini havt gó›ar árgangir, so ta› hevur kanska ikki bara veri› evnini, sum hava gjørt munin.

Vit spurdu eisini Sigrun, um ta› bara var solei›is, at tær vóru nógv betri, ella vóru ta› eisini a›rir lutir, eitt nú venjingarstø›an, sum vi›førdu hesa sigursgongd.

– Eg veit ikki rættiliga, hvussu eg skal siga. Vit mugu í hvussu so er hava veri› betri enn hinar, tí í fleiri ár smurdu vit øll li›ini av. Akkurát hví vit vóru so nógv betri, er eitt sindur ringt at siga.

– Ivaleyst hevur breiddin í hópinum gjørt sítt. Vit høvdu, sum nevnt omanfyri, fleiri gó›ar aldursbólkar, og ta› vísti seg, at har var altí› onkur at seta vi›, tá leikarar góvust.

– Til samanberingar kann nevnast kyndilsli›i›, sum nú hevur vunni› tvey meistaraheiti›. Tær eru so at siga komnar fram í fremstu rø› samstundis, men hinvegin ger hetta eisini, at ta› ver›ur torført at halda stø›i›, tí ov nógvar fella frá í senn.

Eftir úrslitunum at døma, var mótstø›an lítil og eingin í áttatiárunum. Fyrst í nítiárunum gjørdist talan ofta um nógv meira spennandi dystir, men í flestu førum eydna›ist kortini at vinna bæ›i dystir og meistaraheiti›. Var hetta kanska eisini orsaka› av, at li›i› hev›i vunni› so nógv, og at vir›ingin frá hinum li›unum tískil var stór.

– Ja, ta› hevur í hvussu so er kenst solei›is, tá vit spældu. Ta› tóktist ofta solei›is, at mótstø›uli›i› longu á›renn dystin hugsa›u »Náh, vit skulu spæla móti Neistanum«, og so hildu tær kanska ikki, at nakar møguleiki var fyri sigri.

– Sjálvar settu vit okkum eisini høg mál. T.d. fóru vit altí› á vøllin fyri at vinna vi› minst tíggju málum. Gjørdu vit ikki ta›, so vóru vit ikki nøgdar.

– Ta› vóru sjálvandi eisini li›, sum megna›u at spæla upp ímóti okkum, men fyri tey allar flestu var galdandi, at vit vóru førar fyri at vinna stórsigrar á teimum. Serliga var hetta galdandi seinast í áttatiárunum, har mótstø›an var sera lítil.

Brenni eg til dømis ein 100% møguleika, so er ta› ikki bara ke›iligt. Ta› líkist svartasta ongum

Setti stór krøv

Hetta at seta sær høg mál er kanska eisini ein partur av frágrei›ingini til, at li›i› bara helt á fram at vinna. Ta› ver›ur jú ofta tiki› til, at ta› torførasta er at halda sær á toppinum.

– Ta› t‡dningarmesta er sjálvandi, at spælararnir halda ta› vera stuttligt at spæla. Gjørdu vit ikki ta›, so hev›i ta› als ikki bori› til.

– Ta› eru kanska fleiri, sum halda, at eg ikki altí› havi havt ta› so stuttligt á vøllinum, tí sinnalagi› havi eg altí› havt vi› inni á vøllinum. Sjálv havi eg tó trivist væl vi› hesum, tí ta› at man leggur alt í at vinna, er jú eisini ein partur av spælinum, og hetta krevur jú eisini, at tú hevur hug til at vera vi›.

– Eg má siga, at fari vi› eldhuga inn á vøllin, og brenni eg til dømis ein 100% møguleika, so er ta› ikki bara ke›iligt. Ta› líkist svartasta ongum, fyri at siga ta› solei›is.

– Man kann siga, at havi sett stór krøv. Bæ›i til mín sjálvs og til vi›leikarar, og ta› hevur avgjørt ikki altí› veri› líka lætt. Hvørki hjá mær sjálvum, ella vi›- og mótleikarum, har eg ivaleyst onkuntí› havi veri› ein sonn plága.

– Sosialt hava vit tó altí› havt ta› gott saman, so man kann kanska siga, at eg havi veri› ein annar persónur, tá eg havi veri› á vøllinum.

Lært frá hinum

Í hesum sambandi leggur Sigrun afturat, at ta› sum leikari hevur veri› mennandi, at hon hevur havt royndar og gó›ar leikarar at kappast vi›.

– Ta› hevur ment meg nógv sum leikara, at t.d. Rannvá og Svanna Hanusardóttir hava veri› á li›num. Hetta vóru leikarar, sum man sá upp til, me›an man var i yngru deildunum, og ta› var eisin ilæruríkt at spæla saman vi› teimum.

– Eisini gjørdi hetta, at eg kom at spæla so at siga øll pláss á li›num, tí me›an tær spældu, var sjálvandi eingin, sum solei›is uttan ví›ari kom á mi›- ella bakkplássini, har tær spældu. Hetta var annars pláss, sum eg hev›i spælt á øll ungdómsárini, men tá eg kom á fyrstali› mátti eg byrja sum vongur, fyri sí›ani at arbei›a meg inneftir.

– Ta› hevur í øllum førum ment meg nógv sum leikara. Bæ›i tí eg vi› hesum lærdi, hvussu leiklutturin hjá ø›rum spælarum er, og ikki minst tí eg vi› hesum lærdi, hvussu tær røktu sentralu uppgávurnar.

Ikki bara hondbóltur

Sum nevnt omanfyri, so hevur Sigrun eisni gjørt vart vi› seg í fótbóltshøpi

– Eg byrja›i faktist í B36, fyrsta ári› at kvinnufótbóltur var› leiktur í Føroyum. Eg var tó ikki vi› til at vinna FM vi› teimum, tí ein mána› á›renn kappingin enda›i, skifti eg til HB. Ta› var eins og eg kendi, at ta› var har, sum eg átti at vera. Vinkonurnar hjá mær spældu í HB, og tí kendist hetta meira náttúrligt.

– At eg skifti vi›førdi, at eg ikki slapp at spæla vi› í finaluni, so henni mátti eg fylgja frá ásko›araplássunum, og eg minnist eisini dystin sera væl.

Hóast ta› sostatt ikki gjørdist talan um gull fyrsta ári› í HB, so komu tó fleiri gullmerki seinni.

– Vit vunnu einar tríggjar fer›ir í 80'unum, og so vór›u aftur nøkur FM-heiti› mi›skei›is í 90'unum. Eg var ikki vi› øll árini, tí fyrst í nítiárunum var eg í Danmark í útbúgvingarørindum. Eg fekk tó altí› veri› vi› í onkrum dystum, tá eg var heima og fer›a›ist, so eg kendi meg kortini sum ein part av li›num.

– Eg veit ikki akkurát, hvussu væl vit dugdu at spæla fótbólt. Vit byrja›u jú ikki, fyrr enn vit vóru á lei› 18 ára gamlar, so ta› var sjálvandi avmarka›, hvussu nógv vit høvdu lært.

– Viljin var tó altí› til sta›ar, og ta› var kanska serliga hetta, sum gjørdi, at vit vunnu. Nógv av teimum li›unum, sum vit møttu seinni, høvdu leikarar, sum vóru yngri enn vit, og sum veruliga høvdu vant fótbólt frá barnsbeini. Tær vóru kanska betri fyri enn vit, men kortini høvdu tæ stóra vir›ing fyri okkum, og hetta gjørdi helst eisini mun.

– Hetta havi eg onkuntí› tosa› vi› onkra teirra um. Eitt nú, tá vit hava veri› á landsli›num, har eg so hoyrdi til eldra endan. Tá vóru vit jú allar í sama báti, og onkur teirra tóktist nærum skelka›, nú tær sóu, at vit sum so bara vóru eins vanligir persónar sum tær.

Alt hongur saman

Sjálv ivast hon eitt sindur í, hvat hevur gjørt, at hon eisini í fótbóltinum kom at ver›a partur av einum vinnandi li›i. Spurd, um hetta ikki eisini hongur saman vi› avrikunum í hondbóltinum, ta› at vera von vi› at vinna, sigur hon, ta› so avgjørt er ein partur av frágrei›ingini. Ta›, at man ikki er von vi›, og heldur ikki gó›tekur, at gerast nr. 2.

– Jú, ta› hongur saman. Eg havi ongantí› á nakran hátt gó›tiki› at ver›a nummar tvey. Ta› kundi eg ikki funni› uppá. Um eg ikki vinni, so fái eg gron.

Eg kann væl funni› upp á at runni› eina sigursrundu, um eg vinni í Ludo, ella backgammon

Líkamiki› um talan er um Ludo, ella hvussu?

– Ja, eg kann væl funni› upp á at runni› eina sigursrundu, um eg vinni í Ludo, ella backgammon, sigur hon flennandi.

Nei, ta› er bara solei›is, at ta› at tapa, ta› klári eg ikki serliga væl. Hatta har vi› »tap og vinn vi› sama sinn« ta› er so avgjørt ikki eg.

– Ta› er jú heldur ikki solei›is, at tú vi› vilja letur onnur li› vinna. »Nei, nú hava vit vunni› so ofta, lat heldur onkran annan vinna í ár«, ta› kann ikki siga. Ert tú vanur vi› at vinna, so er einki anna› nóg gott. Ta› ringasta er kanska at síggja, tá onnur taka ímóti einum steypi, sum man heldur vildi átt sjálv.

Gjørdist fótbóltsbossur

Umframt aktiva leiklutin, so hevur Sigrun sum so eisini veri› vi› til at skriva ein part av føroyskari fótbóltssøgu. Hetta var, tá hon gjørdist fyrsti kvinnuligi fótbóltsforma›urin í Føroyum.

– Tá eg var li›ug at lesa, flutti eg sjálvandi heim, har eg í fyrsta umfari fekk starv í Klaksvík. Eg var tó framvegis aktiv í bæ›i hond- og fótbólti.

– Gunnar Mohr ætla›i so at fáa sær eitt sabbath-ár frá nevndararbei›inum, og hann spurdi so meg, um eg ikki kundi fara upp í nevndina. Ta› byrja›i so avgjørt ikki vi› tí, at eg skuldi ver›a forma›ur. Hetta kom ikki upp á tal, fyrr enn eg var komin í nevndina, og vit skuldu skipa okkum. Eg haldi, at teir langt sí›ani høvdu tosa› sína millum um hetta, uttan at eg tó hev›i fingi› so nógv at vita, og tá sessurin so stó› mær í bo›i, ja, so hví ikki. Ta› hev›i eg so einki ímóti at royna.

Sigrun sat so sum forma›ur í nærum tr‡ ár. Spurd, um ta› kanska var naka› serligt, at sita so høgt í eini mannfólkaver›, sigur hon, at sjálvandi var ta› ett sindur serligt.

– Eg minnist serliga, ta› einu fer›ina, at ein spurdi, um ta› nú var rætt, at eg skuldi vera forma›ur í HB. Kanska ikki so nógv, tí eg var konufólk, men tí pápi mín var úr B36. Eg haldi tó ikki, at man kann siga, at ta› var nakar ivi um, hvønn eg arbeiddi fyri.

Kosta›i

Annars heldur Sigrun, at starvi›, sum fótbóltsforma›ur var vi› til at stytta aktiva lív hennara.

– Ta› var eins og alt kom at ganga upp í røkur hjá mær. Eg var forma›ur í HB, venjari hjá Neistanum, venjari hjá einum U-16 li›i, umframt at eg spældi bæ›i hond- og fótbólt, so tí›in til onnur ting var ikki hin stóra. Sæ› í bakspeglinum, so veit eg ikki, um eg hev›i tíma at gjørt ta› sama eina fer› aftuar.

– Ta› vi›førdi eisini, at man líka sum troytta›ist, og tá fer›in so fyrst var› sett ni›ur, var ta› sera torført hjá mær at koma í gongd aftur.

– Man skuldi kanska havt sagt nei til okkurt av hesum, men ta› bleiv bara solei›is. Neistin stó› í august og tørva›i ein venjara, og so játta›i eg at taka vi›. Landsli›i› helt eg meg heldur ikki kunna siga nei til. Eg hev›i ongantí› sjálv fingi› hendan møguleikan, og eg kundi líka sum ikki taka møguleikan frá hesum leikarunum, tí eg visti, hvat ta› merkti hjá teimum.

Hendir ikki aftur

Nú er aktivi leikluturin hjá Sigrun so av, men framvegis er hon at síggja sum ásko›ari, tá dystir eru í Gundadali og uppi á Hálsi.

Seinnu árini hevur einki av li›unum havt sama einaveldi, sum kvinnuli›i› hjá Neistanum hev›i, og spurd, roknar Sigrun ikki vi›, at hetta fer at henda aftur.

– Nei, ta› rokni eg ikki vi›. Fyrst og fremst tí ta› nú eru komnir pengar í bæ›i hond- og fótbóltin, og einki felag sleppur at hava ein so stø›ugan leikarahóp í eitt somiki› drúgt áramál.

– Onnur feløg fara altí› at taka leikarar frá, solei›is at stamman á li›num ver›ur brotin. Hjá monnunum hevur VÍF veri› samanlagt nógv besta li›i› seinnu árini, men onnur li› hava eisini stungi› seg fram. Nøkur ár var ta› Kyndil, onnur StÍF. Í fjør spældi Áki Olsen so vi› Neistanum, og var vi›virkandi til, at teir gjørdust meistarar. Hetta er eitt dømi um, at li›ini ikki sleppa at halda eins væl upp á leikararnar, sum tey hava gjørt.

– Ta› er kanska heldur ikki rætt fyri ítróttina, at eitt li› er so einará›andi, men ta› var kortini ótrúliga stuttligt at vera partur av einum slíkum li›i.

Ta› er kanska heldur ikki rætt fyri ítróttina, at eitt li› er so einará›andi, men ta› var kortini ótrúliga stuttligt at vera partur av einum slíkum li›i

Sigrun heldur, at ein av orsøkunum til gó›u úrslitini hjá Neistanum hava veri›, at ta› alla tí›ina fór ein spakulig útskifting fram

Tá man er vanur at vera í toppinum, setir man sær ikki sum mál at gerast nummar tvey, sigur leikarin, sum ongantí› er nøgd vi› ta› næstbesta

Um leiklutrin sum venjari og forma›ur heldur Sigrun, at hetta hevur stytt um aktivu karrieruna hjá sær